VIÐMERKINGAR

# Nakrir tankar um Getsemane

*Símun Absalonsen*



Sum aðrar verksmiður framleiða fjølmiðlar eisini sína vøru. Tá miðlarnir líða av rávørutroti verður hetta stundum rópt agurkutrupulleiki. Tann til tíðir so soltni miðlaheimurin í Føroyum hevur funnið eina nýggja rávøru - ein samkoma í einum kjallara í Klakksvík. Hetta nýggja fundið og frambrotið í nýføroyskum tabloidjournalistikki hevur gjørt "erkabiskuppin" André Matas til samrøðuevni um alt landið.

Tað byrjaði í Dimmu og helt fram í "Góðan morgun Føroyar". Kjallarin í Klaksvík fylti síðani nógv í einum óvanliga subjektivum innslagi í prime time sendingini "Dagur og vika". Sosialurin vil nú eisini hava sín part av kjallarakvotuni, hóast blaðið samanborið við hinar miðlarnar er nakað seint á sjóvarfallinum. Men tað sum er mist við at koma ov seint, kann vinnast aftur við at rópa hart. Og tað ger Sosialurin í ólukkumát tá forsíðan verður ruddað og sálarfrøðingurin Eyðun Joensen trínur fram.

Spennandi verður at síggja hvør miðil man eiga næsta boðið. Nú útlendingar leggja so nógv undir seg í Føroyum, kunnu vit kanska vænta BBC ella CNN at gera innrás í kjallaran í Klakksvík?

### Pastorurin á Oyri

Nú havi eg ongantíð verið í nógv umrødda kjallara, men eg kenni eitt sindur skyldmannin André Matras á Norðoyri. Og oyramaðurin man helst standa eitt sindur spyrjandi, nú miðlarnir eftir fáum vikum hava gjørt hann til almennan persón í Føroyum.

Orsakað av øllum miðlarokinum er André eftir hondini vorðin ímyndin av bæði einum og øðrum. Tað sveiggjar heilt frá demagogum sum Adolf Hitler og Jim Jones til imamar, reformatorar og guruar. Og sálarfrøðingar í Havn tykjast nú so dugnaligir, at teir kunnu fjardiagnosera mentalu støðuna hjá pastorinum á Oyri.

Sjálvur haldi eg at André er bæði undir og yvirmettur. Hann er treyðugt nakar erkabiskupur ella partisanur, men ein miðal hampa oyramaður við báðum beinum á jørðini, men ber kanska høvdið hægri enn jantelógin her á landi kann loyva.

Tað sum pressan serliga hevur funnist at er, at nøkur menniskju hava funnið nøkur virði, sum tey meta hava týdning, og hava tí valt at raðfest øðrvísi. Og júst her lúrir tann stóri vandin og pressan ber ótta fyri sálarligu vælferðini hjá ungum klakksvíkingum.

Nú eri eg sjálvur klakksvíkingur við stórum K, sum hevur búð meira enn 25 ár í høvuðsstaðnum. Tað undrar meg ikki sørt at høvuðsstaðarpressan, hvørs heimur ofta er avmarkaður til tað, sum rørir seg ímillum Hoyvíkshagan og Glyvursnes, brádliga hevur fingið so stóran áhuga fyri einum kjallara í Klakksvík. Ikki minst undrar hetta tá havt verður í huga, at í her í høvuðsstaðnum liggur partur av okkara vakra ungdómi hvørt vikuskifti og rullar í gøtunum til ljósan morgun, stundum ávirkaður av harðari evnum enn rúsdrekka, og uttan at hetta tykist at vekja stórvegis ans hjá miðlum, sosialum myndugleikum ella sálarfrøðingum. Tað er gott at høvuðsstaðuin er vorðin góður við Klakksvíkina, men eg vóni ikki, at Havnin gloymir at sópa fyri egnum durum.

### Fløgubrenning - hvat er tað?

Hetta gandaorð hevur nú fingið dupultan týdning. At brenna fløgur kann nú annaðhvørt merkja at avrita ella beina fyri, og hesi samanblanding hava klakksvíkingar fingið mikið skemt burturúr.

Tað sum er minni skemtiligt er, at hugurin at beina fyri ávísum lutum verður tikið sum tekin um sálarliga ørsku. Um so er, so hava mangir frægir mentamenn í Føroyum gjøgnum tíðirnar verið sálarliga ørir. Eg loyvi mær tí at tríva eitt sindur í søguna og nevna onkran teirra.



*Jóhann við Sjógv. Av átrúnaðarligum orsøkum beindi sjóvarbóndin fyri meginpartinum av sínum skaldskapi*



*Kristina í Vátutoft*

### Jóhann við Sjógv

Sjóvarættin í Kollafirði hevur fostrað nøkur av mætastu skøldum føroyinga. Millum teirra kann nevnast gamli sjóvarbóndin, Jens C. Djurhuus (1773-1853), Jens Hendrik Djurhuus, T. N. Djurhuus og ikki minst áarstovubrøðurnir í Havn, Janus og Hans Andrias. Eitt minni kent skald úr ættini er Jóhan Dam (1863-1925), ið var bóndi við Sjógv.

Í Úrvali 1967 er prentaður áhugaverdur fyrilestur, ið táverandi løgmaður P.M. Dam helt í Útvarp Føroya um tann minni kenda yrkjaran í ættini - farbróðurin Jóhan við Sjógv. P. M. Dam var sum nevnt av sjóvarættini og hevði góðar skaldagávur. Hann yrkti bæði í bundnum og óbundnum máli. Í Varðanum nr. 37 lýsir hann við skaldsligum hegni farbróðurin soleiðis:

*Eitt andagos úr ævunum,*
*tú søgu sóma bar.*
*Um firrað ferð av bævrunum,*
*tó flogið fagrast var.*

Leggjast kann aftrat, at í "Heimamissiónssangbókini" eigur P.M. Dam fleiri sálmar - bæði upprunaligar og týddar.

Í áðurnevnda útvarpsfyrilestri metir P.M.Dam, at skyldmaðurin Jóhann, við sínum skaldagávum, kemur upp á síðuna av mætastu skøldunum í ættini. Tað sigur ikki so lítið tá ein er í kapping við t.d. áarstovubrøðurnar.

Jóhann lærdi seg týskt og franskt, og serliga væl enskt og fornnørrønt. Hann bardi seg eisini fram til at lesa bíbliuna á frummálinum. Slík málslig avrik munnu vera eindømi í Føroyum í seinna helmingi av 1800talinum. Jóhann sat somuleiðis á Føroya Løgtingi í 20 ár.

P.M. Dam, ið ofta vitjaði sjóvargarðin á ungum aldri, viðgerð tann mentanarliga tvídráttin ið farbróðurin drógst við, og fyrrverandi løgmaður hevur størstu virðing fyri tí raðfesting og lívskós, ið Jóhann valdi.

Í ævisøguni eftir J.H.O. Djurhuus viðgerð Hanus Kamban tey ymisku sjóvarskøldini og um Jóhann sigur Hanus soleiðis:

"Klovningur kom í sinni hansara, eitt stríð millum ta norrønu dýrdina og tann evangeliska kristindómin. End-in var, at Óðin mátti lúta, og skaldið brendi at kalla alt, hann hevði yrkt. Jóhann er eitt merkisvert dømi um, hvussu tað kundi gangast einum viðkvæmum andsmenni í broytingartíðini aftan á 1856."

### Vicor Danielsen

Tað er neyvan neyðugt her at geva eina nærri lýsing av Victori sum skald. Danski heimamissiónstrúðboðarin Ryving Jensen hevði stóra ávirkan á Victor, og hetta førdi til eina grundleggjandi broyting í 1913. Ein avleiðing av hesum var, at Victor ruddaði upp í mentanararvinum og brendi hóp av bókum. Hann plagdi at taka til, at seinasta bókin sum fór í eldin var "Holbergs Comet".

Eg skal vera tann fyrsti at viðganga, at eg skilji ikki til fulnar víðgongdu framferðina hjá mæta sjóvarskaldinum og Victor. Men eg ætli mær at vera tann seinasti at fella dóm yvir teirra avgerðir. Teir høvdu avgjørt verið førir fyri at svara fyri seg. Best dámar mær hugburðin hjá P. M. Dam, har tú velur umhugsni og virðing, heldur enn bráðar niðurstøður.

### Ótespiligt tekstinnihald

Jóhan við Sjógv og Victor áttu hvørki fløgur ella MP3, ið man vera høvuðsandskelda hjá føroyska ungdóminum nú á døgum. Eg kenni ung her á landi ið hava ruddað upp í pørtum av sínari fløgugoymslu. Ein av orsøkunum er, at tekstinnihaldið kann vera av slíkum slag, at tað er ótespiligt føði fyri sálina: Harðskapur, ótrúskapur, morð, neyðtøka, satanisma osfr. eru ikki óvanlig fyribrigdi í teksthøpi. Summar av hesum tekstum troysti eg mær heilt einfalt ikki at seta á prent her. Á heimasíðuni www.goodfight.org verður varpað ljós á vandan í hesi sálarføði.

Tað sum Jóhann við Sjógv og Victor beindu fyri, mundi vera harmleyst samanborið við nógv av tí eitri, ið føroyska ungdómssálin drekkur í seg í dag.

### Sálarfrøðingar